# Avtala

## millum

## Fíggjarmálaráðið og Felag Tænastumanna Landsins

Visandi til § 31 i tænastumannalógini er gjørd henda avtala.

**Lønirnar hækka í tíðarskeiðinum soleiðis:**

Tann 1. oktobur 2022 hækkar lønin 3,80 %
Tann 1. oktobur 2023 hækkar lønin 4,20 %
Tann 1. oktobur 2024 hækkar lønin 4,75 %

**Vaktarskipan á Fiskiveiðueftirlitinum (Vørn)**
Í samband við protokolatið frá semjuni 2020, um vaktgangandi á Fiskiveiðieftirlitinum verður henda skipan framyvir soleiðis:
Vaktgangandi á Fiskiveiðieftirlitinum koma undir Arbeiðstíðaravtaluna hjá tollarar og vaktgangandi á MRCC-støðini.

Tó við hesum undantøkum:

- Persónur á vakt yrkadagar, fær 1 tíma um dagin. Viðkomandi fær yvirtíðarløn fyri hendan tíman.
- Persónurin á vakt arbeiðir 2 tímar leygardag og 2 tímar sunnudag. Viðkomandi fær yvirtíðarløn fyri hesar tímarnar.
- Fyri vakt á á føstum frídegi sambært § 8 í verður latin yvirtíðarløn fyri 3 tímar.

Henda broyting tekur við frá tí degi henda avtala er undirskriva.

**Hundaførarar hjá Taks**
Avtala um tilkallivakt fyri hundaførarar frá 2008 verður strikað, tó verður hundaviðbótin óbroytt.
Hundaførarar verða løntir sambært Arbeiðstíðaravtaluni

**Arbeiðstíðaravtala millum Felag Tænastumanna Landsins og Fíggjarmálaráðið**
Í §3, stk 1 verður henda broyting gjørd: "Starvsfólk eiga 4 vikur fram at vita, nær tey skulu arbeiða, og nær tey hava frí."

**Barnferð**
Starvsfólk, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.

*Stk. 2.* Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann starvskvinna fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir føðing fær starvskvinna farloyvi við løn í 24 vikur.

Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis verða bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.

*Stk. 3.* Prógvar starvsfólkið við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør 4 vikur ella fyrr undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvsfólkið hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.

*Stk. 4.* Umframt nevndu sømdir kann starvsfólk fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

*Stk. 5.* Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Frá 1. oktober 2024 kunnu hesar 10 vikurnar við løn liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið eftir viku 14.

*Stk. 6.* Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.

*Stk. 7.* Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.

*Í Tinganesi tann 18. januar í 2024*

*Felag Tænastumanna Landsins*

*Meinhard Gaardlykke, formaður*

*Fíggjarmálaráðið*

*Ruth Vang, landsstýriskvinna*

*Jón Mortensen, lønarstjóri*